Visjón 2015:

# Gunnleivur slapp við

**Eftir at Gunnleivur Dalsgarð, formaður Starvsmanafelagsins gjørdi vart við ónøgd sína, um at fakfeløgini ikki vóru umboðað í strategibólkinum, varð hann biðin um at umboða fakfeløgini**

VISJÓN 2015
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Millum atfinningarnar, sum hava verið frammi í sambandi við Visjón 2015 hjá landsstýrinum, hevur verið nevnt, at fakfeløgini ikki vóru umboðað í arbeiðsbólkinum, sum skal orða eina visjón fyri arbeiðsmarknaðin í 2015.

Undir tíðindafundinum á Hotel Føroyum, tá embætisfólkini hjá løgmanni vóru liðug við powerpoint framløguna av visjónsætlanini, tók formaður Starvsmannafelagsins orðið. Og hann spurdi, hvussu tað bar til, at onki umboð fyri løntakaran var í arbeiðsbólkinum. Gunnleivur segði, at hann helt tað vera løgið, at onki umboð var fyri fakfeløgini, tá uppgávan hjá arbeiðsbólkinum er at orða eina visjón, og at tað møguliga verða grundleggjandi fakfelagspolitiskar avgerðir, sum skulu viðgerast. Bjarni Djurholm svaraði Gunnleivi, at landsstýrið metti Páll Nielsen, advokat, vera eitt hóskandi umboð fyri



*Gunnleivur Dalsgarð helt tað vera løgið, at ongi fakfeløg vóru við í Visjón 2015*

fakfeløgini, tí hann hevur gott innlit í fakfelagsmál og hann í mongum øðrum førum hevði umboðað fakfeløgini.

Síðani hendi tað, at Bjarni Djurholm setti seg í samband við Gunnleiv, og bjóðaði honum sess í arbeiðsbólkinum.

Visjón 2015:

# Fakfeløgini eru vælkomin við

**Tað hevur ongantíð verið ætlanin at útihýsa nøkrum, sigur Bjarnir Djurholm, vinnumálaráðharri, sum hevur tikið atfinningarnar til sín, og bjóðað feløgunum við í 2015.**

VISJÓN 2015
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í samrøðu við Sosialin, sigur Bjarni Djurholm, at í upprunaliga strategibólkinum, sum skal orða framtíðar arbeiðsmarknað, metti landsstýrið, at áhugamálini hjá løntakarunum vórðu væl umboðað av Pálli Nielsen, advokati.

– Páll hevur serligt innlit í arbeiðsmarknaðin, og hann hevur í mongum førum umboðað fakfeløgini, sigur Bjarnir Djurholm, og heldur fram:

– Men tað hevur ongantíð verið okkara ætlan at útihýsa nøkrum, sigur Bjarni Djurholm og greiðir frá, at hann eftirfylgjandi tók



*Bjarni Djurholm sigur, at fakfeløgini sjálvsagt skulu við, um tey meta tað neyðugt*

atfinningarnar hjá Gunnleivi Dalsgarð til eftirtektar, og at hann eisini setti seg í samband við Ingeborg Vinther frá Føroya Arbeiðarafelag. Hon segði seg vilja taka málið upp við hini feløgini. Síðani sendi Vinnumálaráðið feløgunum á privata arbeiðsmarknaðinum eitt bræv, har heitt verður á tey at velja umboð í strategibólkin, ynsktu tey tað.

– Lat tað vera sagt, at vit sjálvsagt ynskja at fáa sum best burtur úr, og um fakfeløgini ikki meta seg vera væl umboðað í bólkinum, so skulu tey sjálvsagt eisini vera vælkomin við. Men, tá vit settu strategibólkarnar hildu vit, at allur arbeiðsmarknaðurin var væl umboðaður, sigur Bjarni Djurholm.

## FAKTA 2015

### Arbeiðsmarknaður

**Allýsing og avmarking**

Tað er av alstórum týdningi fyri hin einstaka og fyri vinnuna

- at arbeiðsmegin er flytfør
- at hin einstaki hevur ella kann fáa sær eftirspurdar førleikar
- at friður valdar á arbeiðsmarknaðinum
- at tað eru skipanir, sum gagna hinum einstaka, bæði í og eftir virkna arbeiðslívið

Visjónin um arbeiðsmarknaðin skal fevna um:

- Smidligar skipanir fyri útvegan av arbeiðsmegi
- Førleikamenning av arbeiðsmegi:
  - uppgraderingar av førleika hjá arbeiðstøkari arbeiðsmegi
  - uppgraderingar av førleika hjá ófaklærdari arbeiðsmegi
  - framhaldandi eftirútbúgvingarskipanir
- Skipanir at forða fyri og at loysa trætumál skjótt
- Persónligar eftirlønarskipanir, sum samvirka við fólkapensión og samhaldsføstu arbeiðsmarknaðarskipanina

### Persónar í strategibólkinum:

- Arne Poulsen, formaður
- Maria Róin, Vinnumálaráðið
- Snorri Fjalsbak, lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum
- Kári á Rógvi, advokatur og formaður í Javnstøðunevndini
- Kristoffur Laksá, Arbeiðsgevarafelagið
- Páll Nielsen, advokatur
- Alfred Petersen, advokatur
- (Gunnleivur Dalsgarð, Starvsmannafelagið)

### Setningur hjá strategibólki

1) Setast skulu mál fyri arbeiðsmarknaðin
2) Staðfestast skulu teir trupulleikar og/ella avbjóðingar, ið eru fyri at røkka málunum
3) Við støði í teimum málum, sum eru sett og teimum trupulleikum/avbjóðingum, sum eru staðfest, skal orðast ein ætlan fyri, hvussu vit røkka málunum

# Kvinnur í politikk

**Sjónleikarhúsið var fullsett, tá Kvinnufelagið skipaði fyri 8. mars tiltaki**

8. MARS
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

8. mars 2006 var altjóða kvinnudagur, og í tí sambandi skipaði Kvinnufelagið í Havn fyri pallborðsfundi í Sjónleikarhúsinum, har evnið var: Kvinnur í politikk!

Á skránni var Kvinnubuffét á Hafnia frá kl. 17, og kl. 19.30 byrjaði tiltakið í Sjónleikarhúsinum. Har vóru vælkomudrykkir og brellbitar, sum Oddvør Skarðhamar hevði gjørt. Síðani bjóðaði Bergtóra Hanusardóttir, forkvinna í Kvinnufelagnum, vælkomin, og tær báðar, Mia Káradóttir og Heiðrun Petersen spældi tónleik.

Síðani var pallborðsfundur, har hesar luttóku: Lisbeth L. Petersen, løgtingskvinna,

Gunn Joensen, frv. borgarstjóri í Vestmanna, Malan Helgadóttir, bygdarráðslimur, Bjørg Jacobsen, skrivari hjá Javnstøðunevndini, Helena Dam á Neystabø, fyrrv. landsstýris- og løgtingskvinna, Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna og



*Nógvar kvinnur vóru samankomnar 8. mars*

Birta Biskopstø, forkvinna í Kvinnufelagasamskipan Føroya. K Kristianna Rein var orðstýrari. Aftaná var skemt við Marjun í Kálvalíð

Evnið á pallborðsfundinum var sum sagt kvinnur í politikk, og var ikki nógv nýtt undir sólini har. Tó komu nøkur uppskot til fundarsamtyktir, sum snúu seg um: at fáa Granskingarráðið at geva verkætlan um evni, at fáa javnstøðuspurningin við, nú vallógin skal endurskoðast, og at gera eina visjón 2015 á javnstøðuøkinum.